Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 29.10.2020 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Jóhan Christiansen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 73/20 | 20/00346-1 | Mál 20/00346 Nøvn til innangarðvegirnar í Eysturkommunu. Málslýsing og tilmæli | 3 |
| 74/20 | 20/00350-1 | Mál 20/00350 Veganavn undir Gøtueiði. Málslýsing og tilmæli | 5 |
| 75/20 | 20/00094-1 | Mál 20/00094 Fríðkan av økinum kring nýggja lugarið | 6 |
| 76/20 | 20/00248-2 | Mál 20/00248 Yvirtøka av "Gamla skúla" í Leirvík. Málslýsing og tilmæli. | 8 |
| 77/20 | 20/00338-1 | Eykajáttan til Gøtubrá | 10 |
| 78/20 | 20/00202-14 | Umvæling av Líf-húsinum, køkur og gólv | 11 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 79/20 | 19/00606-2 | Mál 19/00606 Umsókn um vinnustykki á Kráartanga. Málslýsing og tilmæli. | 12 |
| 80/20 | 20/00369-2 | 20/00369 - Umbøn um ummæli í samband við keyp av neystagrundstykki matr. nr. 276 Syðrugøtu bygd | 15 |
| 81/20 | 20/00360-2 | 20/00360 - Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 165a og 471 LV | 16 |
| 82/20 | 20/00327-4 | 20/00327 - Uppskot til broyting í býarætlan (byggisamtykt) fyri Eysturkommunu | 17 |
| 83/20 | 20/00383-1 | 20/00383 - Sundurbýti av matr. nr. 193d og 193e í NG | 18 |
| 84/20 | 20/00292-17 | 20/00292 - Umsókn um byggiloyvi til lagur/vaskihøll hjá Autolakkering - matr. nr. 193f | 19 |
| 85/20 | 20/00374-4 | 20/00374 - Umsókn um byggiloyvi til úthús á matr. nr. 215n | 20 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 73/20 Mál 20/00346 Nøvn til innangarðvegirnar í Eysturkommunu. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Navnanevndin | 24.09.2020 | 3/20 | 20/00346-1 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 73/20 | 20/00346-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Viðmerkingar frá Navnanevndini 6. November 2019:<br><br>Innangarðsvegur í Leirvík eitur Brekkuvegur.<br>Í Norðragøtu verður innangarðsvegurin á mannamunni nevndur Koyrvegur, er hetta eitt hóskandi formelt navn?<br>Í Syðrugøtu eru fleiri inangarðsvegir. Navnannevndin hevur frammanundan mælt til at tann niðasti vegurin eitur Breiðávegur.<br>Vegurin frá svinginum og út á rættina kundi itið Mýravegur.<br>Vegurin frá svinginum og í landsvegin kundi itið Innangarðsvegur, ella í Gerðunum/Gerðinum.<br>Gamli landsvegurin kundi itið undir Hólheygum. Vegurin omanfyri grótbrotið kundi itið undir Steinabrekku |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Navnanevndin 24. september 2020**
Navnanevndin mælir til fylgjandi:

**Í Syðrugøtu** eitur vegurin frá grótbrotinum omanfyri Íshúsið og út til svingið á Breiðá «Breiðávegur».
Vegurin frá svinginum úti á Breiðá og út á rættina eitur «Mýravegur».
Vegurin frá svinginum úti á Breiðá og í gamla landsvegin eitur «Innangarðsvegur».
Gamli landsvegurin eitur «Hólheygavegur».
Vegurin frá Gøtuvegi (landsvegnum) og niðan til seyðhúsið hjá Poul Arna Jacobsen eitur «undir Steinabrekku»

**Í Norðragøtu** eitur innangarðsvegurin omanfyri bygdina “Koyrvegur”.

Innangarðsvegurin vestanfyri Gøtuveg (landsvegin) við rættina hjá Ognarhaganum eitur «Sarpuvegur».

Navnanevndin mælir til at skeltir verða gjørd og sett upp sum skjótast.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini.

## 74/20 Mál 20/00350 Veganavn undir Gøtueiði. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Navnanevndin | 24.09.2020 | 4/20 | 20/00350-1 |
| 2 Navnanevndin | 21.10.2020 | 5/20 | 20/00350-1 |
| 3 Býráðið | 29.10.2020 | 74/20 | 20/00350-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Navnanevndin 24. september 2020**
Málið tikið av skrá og verður komandi Navnanevndafundi

**Navnanevndin 21. oktober 2020**
Navnanevndin hevur viðgjørt hvussu vegurin frá Eiðisbrekku og norðeftir. Á mannamunni hevur vegurin verið kallaður «millum Gerðini» og navnanevndin mælir til at varðveita hetta navnið.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini

# 75/20 Mál 20/00094 Fríðkan av økinum kring nýggja lugarið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 20.04.2020 | 9/20 | 20/00094-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 27.04.2020 | 25/20 | 20/00094-1 |
| 3 Vinnunevndin | 19.10.2020 | 39/20 | 20/00094-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 26.10.2020 | 69/20 | 20/00094-1 |
| 5 Býráðið | 29.10.2020 | 75/20 | 20/00094-1 |

**Málslýsing:**

Uppskot er komið frá teknisku umsiting um fríðkan av økinum kring nýggja lugarið. Ætlanin er asfaltera økið, sum víst á tekningini í málinum. Harumframt er ætlanin at leggja eitt 50 cm lag av0-8mm skerv í byggiøkinum uttanfyri asfaltið.
Afturat hesum koma so ristir til avvatning av økinum sum verður asfaltera, og brunnar og kloakrør. Millum asfaltøkið og byggiøkið, verða lagdir kantsteinar. Eisini er ætlanin at leggja flísar afturat verðandi túni við flísum.

Kostnaðarmetingin er 600.000 kr. uttan Mvg.

**Ískoyti 14. Oktober 2020**
Innheintað er eitt tilboð, sum lýst í málinum, og við flísatúnið og tilhoyrandi kantsteinum, sum liggja allanvegin framvið sjóvarmálan á stykkinum.

Við bóðu tvær fyritøkur um undirhondstilboð, og ein hevur givið Eysturkommunu tilboð.

Tilboðið er upp á kr. 879.679,70 u/mvg.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

500.000 kr. eru settar av til fríðkan av økinum kring nýggja lugarið

**Tilmæli**

Mælt verður til at innheinta tilboð upp á verkætlanina skjótast gjørligt.

**Ískoyti 14. Oktober 2020**
Mælt verður til at taka av tilboðnum og veita eykajáttan til endamálið

**Vinnunevndin 20. april 2020**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til at innheinta tilboð upp á verkætlanina. Vinnunevndin ynskir, sum alternativ, eisini at innheinta tilboð, har flísatúnið og tilhoyrandi kantsteinar liggja allanvegin framvið sjóvarmálan á stykkinum.

**Fíggjarnevnd 27. april 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini

**Vinnunevndin 19. oktober 2020**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini mælir til at taka av tilboðnum. Sum alternativ, nú ligið er út árið, at seta upphæddina av á fíggjarætlanini 2020.

**Fíggjarnevnd 26. oktober 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtyk at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

# 76/20 Mál 20/00248 Yvirtøka av “Gamla skúla” í Leirvík. Málslýsing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.10.2020 | 65/20 | 20/00248-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.10.2020 | 71/20 | 20/00248-2 |
| 3 Býráðið | 29.10.2020 | 76/20 | 20/00248-2 |

**Málslýsing:**

Í 1999 byrjaði ein 5 manna bólkur (“Áhugabólkurin Gamli Skúli”) at arbeiða fyri at ogna sær gamla skúlan í bygdini frá 1883, sum Føroya Stórlosja átti. Skúlin var í rættiliga ringum standi, og hóast ymsir tónleikabólkar í bygdini høvdu brúkt hann sum venjingarhøli seinastu 25-30 árini, stóð hann tá tómur.
Føroya Stórlosja vísti áheitanini frá áhugabólkinum um at keypa Gamla Skúla vælvild og varð hann keyptur 22. juli 2000 frá Føroya Stórlosju.

Ætlanin við keypinum var at bjarga bygninginum, tí hann var mettur at hava stóran søguligan týdning fyri bygdina. Somuleiðis var ætlanin at arbeiða fyri at seta bygningin í upprunaligan stand, soleiðis at hann kundi hýsa einhvørjum, sum hevur bygdasøguligan týdning.

Tað var ongantíð ætlan áhugabólksins, at hann framyvir skuldi standa sum eigari av skúlanum, og 22. september 2003, varð áhugafelagið Fornminnisfelagið í Leirvík stovnað, og Bygdasavnið Gamli Skúli varð stovnað á eykaaðalfundi hjá Fornminnisfelagnum í Leirvík 08. desember 2003.

Síðan stovnanina, hevur virksemið hjá Bygdasavninum mest verið at seta Gamla Skúla í stand.
Seinastu 5 árini hevur nógv samskifti verið við Eysturkommunu um ”Gamla Skúla”. Eysturkommuna hevur síðani 2017 sett upp til 300.000 kr. av á íløgusíðuni fyri at gera skúlan í stand. Í 2020 er 150.000 kr settar av. Í dag er niðasta hædd so gott sum liðug, nýggj vindeygu eru sett í, bygningurin er partvís klæddur, hitapumpa er sett til o.s.fr.

Bygdasavnið Gamli Skúli hevur, eftir samskifti við umsitingina, sent skriv inn til kommununa, um at nú er tíðin komin til at bygningurin formelt verður handaður Eysturkommunu.
Ein av orsøkunum til hetta er, at Bygdasavnið, sum ikki hevur verið virkið seinastu árini, ikki hevur fíggjarliga orku at halda bygningin.

Bygdasavnið Gamli skúli hevur samskift við Tjóðsavnið viðv. at Eysturkommuna yvirtekur bygningin. Sambært 3 stk 4 í løgtingslóg um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. Juli 1986 loyvi Tjóðsavnið Bygdasavninum Gamli Skúli at avhenda gamla skúlan í Leirvík til Eysturkommunu.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| **Tilmæli** |
| --- |
| Mælt verður til at yvirtaka Gamla Skúla í Leirvík . |

**Mentanarnevndin 19. oktober 2020**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum og mælir til at yvirtaka Gamla Skúla í Leirvík.

**Fíggjarnevnd 26. oktober 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini

# 77/20 Eykajáttan til Gøtubrá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 22.09.2020 | 66/20 | 20/00338-1 |
| 2 Býráðið | 24.09.2020 | 69/20 | 20/00338-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 26.10.2020 | 73/20 | 20/00338-1 |
| 4 Býráðið | 29.10.2020 | 77/20 | 20/00338-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| í mars í fjør bleiv samtykt at gera eina "útistovu" á Gøtubrá og tikið var av tilboðið uppá arbeiðið tann 9. desember. Arbeiðið bleiv tó ikki gjørt í fjør, emn er nú í gongd og verður liðugt í ár. Játtanin til arbeiðið er tó ikki flutt til 2020 og tískil verður neyðugt at veita eykajáttan á 700 t.kr til hetta |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 700 tkr. verða fluttar frá grein 3 til grein 2, annars eru ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan á 700 t.kr, og at peningurin verður tikin av játtanini til nýggj Gjáa. Øll játtanin til Gjáa í ár verður ikki brúkt. |

**Fíggjarnevnd 22. september 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 24. september 2020**
Einmælt samtykt at taka udir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Fíggjarnevnd 22. september 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 26. oktober 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

## 78/20 Umvæling av Líf-húsinum, køkur og gólv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | | | 20/00202-14 |
| 2 Býráðið | | | 20/00202-14 |
| 3 Fíggjarnevnd | 26.10.2020 | 74/20 | 20/00202-14 |
| 4 Býráðið | 29.10.2020 | 78/20 | 20/00202-14 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| À fíggjarætlanini fyri 2020, eru 800 t.kr avsettar til umvæling av Líf-húsinum. Tikið er av tilboðið frá Spf/ Jóhan Heinesen, uppá umvæling av klædningi og pørtum av gólvinum inni í húsinum. Eisini er tikið av tilboði uppá nýggj vindeygu.<br><br>Ynski er at alt gólvið í salinum verður skift og at køkurin verður viðkaður og nýggjur køkur verður keyptur. Um hetta skal gerast er neyðugt við eini eykajáttan á 425 t.kr |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at veita eykajáttan á 425 t.kr soleiðis at alt gólvi kann skiftast og at umstøðurnar í køkinum gerast betri. |

**Fíggjarnevnd 26. oktober 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og veita eykajáttan á 425 t.kr.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 79/20 Mál 19/00606 Umsókn um vinnustykki á Kráartanga. Málslýsing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 09.12.2019 | 39/19 | 19/00606-2 |
| 2 Vinnunevndin | 17.02.2020 | 7/20 | 19/00606-2 |
| 3 Vinnunevndin | 20.04.2020 | 12/20 | 19/00606-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 27.04.2020 | 19/20 | 19/00606-2 |
| 5 Býráðið | 30.04.2020 | 27/20 | 19/00606-2 |
| 6 Vinnunevndin | 19.10.2020 | 40/20 | 19/00606-2 |
| 7 Býráðið | 29.10.2020 | 79/20 | 19/00606-2 |

**Málslýsing:**

Fyritøka søkir um loyvi at langtíðarleiga vinnuøkið á Kráartanga. Ætlanin er at byggja tvær lonir á 5 bygningar stk., tvs. 10 bygningar tilsamans.

Støddin á hvørjum bygningi verður **12x12 metur**, so hvør bygningslon verður áleið **700 m2/stk**. Samlaða hæddin verður **10 metur høg**, sum er innanfyri ásetingarnar fyri C2 øki. Viðheftu tekningarnar sum eru í málinum eru ein skitsa av verkætlanini. Longdin á hvørji lon er 60 metur, og ikki 44 metur, sum sæst á tekningunum.

Umsøkjarin vil fyrst og fremst at bjóða vinnulívinum í Eysturkommunu at keypa bygning, og á henda hátt sentralisera vit vinnulívið.
Sambært umsøkjaranum er ætlanin, at hvør einstøk fyritøka avgerð hvat teirra bygningur verður nýttur til, innanfyri teirra vinnu endamál, tó má hetta verða í samráð við kommununa, tá hugsa verður um umhvørvisdálking.
Møguleikar verða bæði fyri handverkara virksemi, kontór hølum, og øðrum vinnumøguleikum annars.

Umsøkjarin metur, at tørvurin er stórur hjá vinnuni í kommununi at fáa hølir, og sæst hetta m.a aftur á í umhvørvinum runt um.
Ætlanin er at selja bygningarnar áðrenn teir verða bygdir. Tí verður ein lon bygd fyrst, og so sæst um tørvur er fyri eini lon aftrat.
Ætlanin er at bygningarnir verða hitaðir við grønari orku, antin jarðhita ella sjóhita.

**Ískoyti 13. februar 2020**
Vísandi til mál 20/00054 (vinnuøki á Kráartanga) so er Kráartangi ikki klárur enn sum vinnustykki. Har er nógv tilfar sum skal av økinum, ongin kloakk ella vatneliðing og ongin vegur á økinum. Hendan umsøknin er sostatt treytað av at Kráartangi verður gjørdur klárur sum eitt vinnuøki.

**15. oktober 2020**

| |
|---|
| Inn eru komnar nýggjar tekningar frá umsøkjaranum (mailur frá 14. okt. 2020), har lonin sum vendi út ímóti Leirvíksfirði verður flutt inn um hina lonina, so báðar lonirnar liggja eftir einari rekkju.<br><br>Í tekningunum eru nú perkeringspláss teknaði inn, og tekniska umsiting sær onga forðing í hesum.<br><br>Í høvuðsheitum hevur býráðið samtykt, at umsøkjarin kann byggja tí einu lonina ið ikki verður flutt. Her skal tó viðmerkjast, lonirnar fara frá at verða 12m x 12m til at verða 10m x 14m, og hæddin verður tann sama. Upprunaliga var eisini ætlanin at tað skuldi verða 5 bygningar pr. lon, men við nýggju tekningunum er tað 4 bygningar pr. lon. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at leiga umbidna vinnuøkið út til umsøkjaran, so farast kann í gongd at byggja lonirnar. Hetta setir treytir til kommununa, tí umsøkjarin ynskir lonirnar staðsettar uttast á Kráartanga, og enn er ongin vegur gjørdur.<br><br>Mælt verður tó fyrst til, at tekniska umsiting byggimálsviðgerð konkretar tekningar frá umsøkjaranum.<br><br>**Ískoyti 13. februar**<br>Treytað av at Kráartangi verður gjørdur klárur til vinnuøki, har umsøkjarin kann byrja at byggja, mælir umsitingin til, at matrikulera partar av økinum, ið umsøkjarin vil hava.<br><br>**Ískoyti 15. oktober 2020**<br>Mælt verður til at leiga umbidna vinnuøkið út til umsøkjaran, sambært innkomnu tekningunum (mailur frá 14. okt. 2020), so farast kann í gongd við at byggja lonirnar. |

**<u>Viðtøka Vinnunevndin 09. december 2019</u>**
Vinnunevndin samtykkir at umsitingin ger eina gjøgnumgongd av byggisamtyktini fyri Kráartanga áðrenn næsta fundi.
Harumframt samtykkir Vinnunevndin at umsitingin arbeiðir víðari við innkomnu umsóknini, men nevndin ynskir málið á skrá aftur innan avgerð verður tikin.

**<u>Viðtøka Vinnunevndin 17. februar 2020</u>**
Vinnunevndin samtykkir at umsitingin ger eina visualisering av verkætlanini hjá umsøkjaranum. Og her undir at gjøgnumganga byggisamtyktina og møguliga broytingar við tað sama.

**Vinnunevndin 20. april 2020**
Vinnunevndin mælir til at geva loyvi til umsóknina, tó við teimum treytum, at umsøkjarin heldur seg til hæddina á 8,3m, sambært innkomnu tekningum og neystasniðið.
Vinnunevndin mælir at endurskoðað byggisamtyktina fyri kráartanga, við tí fyri eygað, at gera eina serstaka byggisamtykt, sum nágreinar hæddir og snið v.m.

**Fíggjarnevnd 27. april 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Býráðið 30. april 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinunevndini og fíggjarnevndini.

**Vinnunevndin 19. oktober 2020**
Vinnunevndin mælir til at geva loyvi til umsóknina, dagfest 14. okt. 2020, tó við teimum treytum, at umsøkjarin heldur seg til hæddina á 8,3m, sambært innkomnu tekningum og neystasniðið.
Víst verður samstundis býráðssamtyktina í málinum dagfest, 30. apríl 2020, viðv. endurskoðan av byggisamtyktini.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

## 80/20 20/00369 - Umbøn um ummæli í samband við keyp av neystagrundstykki matr. nr. 276 Syðrugøtu bygd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 26.10.2020 | 36/20 | 20/00369-2 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 80/20 | 20/00369-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikð umbøn um ummæli frá Búnaðarstovuni.<br><br>Ánari av neystinum, sum stendur á matr. nr. 276, Syðrugøtu bygd (Undir Gøtueiði) hevur søkt um at keypa undirlendið til neystagrundstykki.<br>Lendið er í dag leigulendi, sum búnaðarstovan umsitur. Eysturkommuna skal hoyrast í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir frá at selja matr. nr. 276, Syðrugøtu bygd. Hetta tí at øki á havnarlagnum í kommununi vanliga eru leigumál. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 26. oktober 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 81/20 20/00360 - Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 165a og 471 LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 26.10.2020 | 37/20 | 20/00360-2 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 81/20 | 20/00360-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánarar av matr. nr. 165a og 471 í Leirvík ynskja at marknaumskipa sambært viðfestu tekning. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsókn um marknaumskipan á møti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 26. oktober 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 82/20 20/00327 - Uppskot til broyting í býarætlan (byggisamtykt) fyri Eysturkommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 26.10.2020 | 38/20 | 20/00327-4 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 82/20 | 20/00327-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Býarplanurin fyri matr. nr. 86z í Norðragøtu skal broytast. Sí skal í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Kostnaðurin liggur um 20.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at broyta býarplanin til B2: Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt, sambært tekning í málinum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 26. oktober 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 83/20 20/00383 - Sundurbýti av matr. nr. 193d og 193e í NG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 26.10.2020 | 40/20 | 20/00383-1 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 83/20 | 20/00383-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við vinnuøki í Gøtudali, skal resterandi økið sundurbýtast til tvey stykkir, hetta verður gjørt sambært viðlagda korti. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Kostnaðurin liggur um 20.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at sundurbýta matr. nr. 193d og 193e í Norðragøtu. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 26. oktober 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. oktober 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarkskipanarnevndini

## 84/20 20/00292 - Umsókn um byggiloyvi til lagur/vaskihøll hjá Autolakkering - matr. nr. 193f

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 26.10.2020 | 41/20 | 20/00292-17 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 84/20 | 20/00292-17 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Autolakering í gøtudali hevur søkt um loyvi at byggja eina vaskihøll til bilar.<br><br>Vaskihøllin er staðsett uttan byggiloyvi. Umsitingin hevur verið á staðnum og mált upp. Frástøðan er 2 metur frá mark, har tað er tættast, sí tekning "Støðumynd, uppmáting av vaskihøll" í málinum.<br><br>Kravið er 2,5 metrar frá mark.<br>Um umsóknin skal gangast á møti, má frávik frá byggilinjuni gevast.<br><br>Av tí at frástøðan millum bygningar ikki skal vera minni enn 5 metrar, kann tað avirkað grannastykkið norðeftir (matr. nr. 193e). |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

### Byggi - og býarskipanarnevnd 26. oktober 2020

Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at ganga umsóknini á møti við tí treyt at ánarin antin flytir lagur/vaskihøllina soleiðis at frástøðan er 2,5 metrar frá mark, ella bindir seg til at yvirhalda brunatrygdina millum komandi grannabygning norðanfyri og bera kostnaðin av hesum.

### Býráðið 29. oktober 2020

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 85/20 20/00374 - Umsókn um byggiloyvi til úthús á matr. nr. 215n

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 26.10.2020 | 42/20 | 20/00374-4 |
| 2 Býráðið | 29.10.2020 | 85/20 | 20/00374-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr. 215n í Syðrugøtu hevur søkt um byggiloyvi til úthús á matr. nr. 215n í Syðrugøtu.<br><br>Úthúsið kemur at standa á mark. Sí skjøl í málinum.<br><br>Um umsóknin skal gangast á møti, má frávik gevast. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at ganga umsóknini á møti |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 26. oktober 2020**

Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. oktober 2020**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

fundurin lokin kl. 19.30

Jóhan Christiansen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen

Hanna Jensen